# Setanar- og starvstreytir fyri adjungeraðar lektarar og professarar á setrinum

**Samtykt á setursráðsfundi 10. juni 2004**

Faklig krøv
Fakligu krøvini til adjungeraðar lektarar/professarar eru sum til fólk í tilsvarandi fulltíðarstørvum á Fróðskaparsetrinum. Fyri at gerast adjungeraður lektari/professari má førleikin hjá viðkomandi persónum verða mettur kvalifiseraður sambært reglunum um førleikameting á Fróðskaparsetrinum.

**Skipanin**
Skipanin við adjungeraðum lektarum/professarum ber m.a. í sær, at persónarnir kunnu

- hava fakliga ábyrgd og tilrættaleggingarábyrgd av ávísum skeiðum, harí m.a. planleggja og dagføra skeið (gera skeiðslýsingar og undirvísingarætlanir) undirvísa og finna møguliga leysalærarahjálp, fyriskipa próvtøkur

- vera vegleiðari/medvegleiðari í BS, BA, MA, MS og Ph.D. verkætlanum, har í m.a. saman við tí lesandi gera eina skipaða leiðbeining og tilrættalegging av verkætlanini og av skeiðum í samband við hana

Miðað eigur at verða eftir, at skipanin stimbrar til synergi millum gransking á setrinum og á øðrum stovnum.

**Samsýning**
Adjungeraður lektari/professari fær fasta mánaðarliga viðbót fyri tað, ið frammanfyri er nevnt undir brotinum "Skipanin", tó burtursæð frá tíð til fyrilestrar, venjingar og leiðbeiningar. Løn verður veitt fyri fyrilestrar, venjingar og leiðbeiningar sambært galdandi takstum á setrinum, um ikki annað er avtalað.

**Ábyrgdarbólkur**
Adjungeraðir lektarar og professarar mynda saman við vísindastarvsliðnum á Setrinum ein *ábyrgdarbólk* fyri hvørja útbúgving, ið stuðlar í planlegging og eftirmeting av útbúgvingum á Setrinum. Til at samskipa arbeiðið hjá bólkinum velur avvarðandi megindeildarráð ein samskipara, sum hevur ábyrgd av regluliga at savna fólkini í bólkinum, í minsta lagi eina ferð hvørja lestrarhálvu.

**Samsýning**
Mett verður, at arbeiðsbyrðan í miðal svarar til ein arbeiðsdag um mánaðin.

Mánaðarsamsýningin verður roknað soleiðis:
<u>grundløn á endastigi + førleikaløn </u>(professarar stig 26, lektarar stig 20)
21,75 arb.dag um mánaðin

Upphæddirnar verða reguleraðar so hvørt sáttmálin millum Magistarafelagið og Lønardeildina verður dagførdur.

Postrúm 272 FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14 FO 100 Tórshavn | Heimasíða www.setur.fo | Teldupostur setur@setur.fo | Telefon: 35 25 00 | Faks: 35 25 01